StÍF-VÍF 21-22 (10-11):

# Tepurt hjá meistarunum

**VÍF sýndi stórspæl í eitt korter, men vóru kortini hepnir at fáa sigurin við sær av Skála**

HONDBÓLTUR – MENN
*Jákup Mørk*




*Fyrstu løtuna av dystinum vóru skjúttarnir hjá VÍF flúgvandi, men restina av dystinum máttu meistarnir stríðast av øllum alvi til tess at tryggja sær sigurin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Fyrstu løtuna av dystinum millum á Skála millum StÍF og VÍF var lítið, sum bendi á, at talan skuldi gerast um nakran spennandi dyst.

Beint framman undan høvdu kvinnuliðini hjá báðum feløgum spælt, og mannfólkini úr Vestmanna tóktust bara at halda fram, har kvinnurnar sleptu.

## Flúgvandi byrjan

VÍF var nevnliga snøgt sagt flúgvandi fyrsta knappa korterið av dystinum. Verjan riggaði væl, strandingar vórðu meira ella minni noyddir at skjóta úti frá, og tá Bárður Nielsen í málinum dugdi væl at lesa skotini, fór einki inn um hjá honum.

Í hinum endanum sóu vit veruliga, hvat meistararnir eru førir fyri í álopspartinum. Pressað varð upp alla tíðina, soleiðis at glottar komu í strandaverjuna, og við teimum skjúttum, sum VÍF hevur, so var hetta sjálvandi ikki ókeypis fyri vertirnar.

Soleiðis fór VÍF upp á sjey mál áðrenn heimaliðið hevði gjørt nakað, og tá so André F. Danielsen eisini hevði fingið reytt kort í hesum tíðarbilinum, tóktist alt at vera avgjørt.

## StÍF hevði takið

Helst var tað eisini hetta, sum vestmenningar hildu, tí ótilvitað byrjaðu teir at seta ferðina niður, soleiðis at strandingar nú eisini sluppu upp í part.

Spakuliga fingu teir betri tak um dystin, og efitr eina langa og deyða periodu hjá vestmenningum, var bráðliga bert hitt eina málið á muni. Av venjarabeinkinum royndi vestmannavenjarin, Páll Poulsen, at broyta gongdina. Millum annað við einum time-out og fleiri útskiftingum, men hóast hetta bøtti nakað um, so fingu gestirnir ongan tíð sama tak á dystinum.

Tvørtur ímóti so vóru tað strandingar, sum høvdu yvirvág størsta partin av seinna hálvleiki.æ Vestmenningar fylgdu við, men tað var leingi líkt til, at teir – eins og í fjør - skuldu koppa á Skála. Ikki minst mundi hugurin hjá bæði ásoðarum og leikarum vera góður, tá StÍF bert átta minuttir undan leikloki økti upp í 20-17.

Vestmenningar gjørdu tá av at mansverja Costin Dumitrescu, og hendan seinasta royndin eydnaðist teimum. StÍF fekk bert eitt mál afturat, og seinastu seks minuttirnar fekst bólturin als ikki inn í málið.

Hjá VÍF hepnaðist nakað betri. Teir togaðu seg nærri og nærri, og tá farið varð undir seinasta minuttin, stóð á jøvnum millum liðini. Vestmenningar dugdu – onkur helt ov væl – at dríggja sær hetta álopið. Endin varð, at teir vunnu sær tríggja metra kast, og eftir at Áki og Sámal høvdu tosað um, hvør skuldi skjóta, endaði alt við, at Sámal hamraði sigurin heim til Vestmanna.

## Krevur meira

Við sigrinum helt VÍF fast um oddastøðuna, har teir eru júst sigurin á Skála framman fyri argastu kappingarneytarnar. Hóast sigurin, so skerst tó ikki burtur, at tað fer at krevja størri stabilitet frá oddaliðnum, um teir framhaldandi ætla sær at halda fast um oddasessin.

Hesa ferð spældu teir upp til sítt besta í eitt korter, og tá er neyvan nakar, sum skalar teimum, men ein dystur fevnir altso um 60 minuttir, so neyðugt verður uttan iva at leingja um góðu løturnar framyvir.

Hjá StÍF er søgan hinvegin framvegis tann sama. Stabiliteturin væntar í ólukkumát. Tað kann væl vera, at teir onkun tíð hava kent seg vónsviknar av dømingini, men hetta er so ikki einasta frágreiðingin. Liðið megnar – tað vístu teir aftur hesaferð - at spæla upp til tey bestu í landinum, men hinvegin eru stig eisini mist móti øðrum liðum, og tað eru fyrst og fremst hesi, sum skulu vinnast, um teir skulu blanda seg upp í oddin hetta kappingarárið.

## Dysturin í tølum

StÍF-VÍF 21-22 (10-11)

**Málskjúttar:**
**StÍF**: Sveinur Justinussen 5(2), Alexandur Johansen 3, Jón Rasmussen 3, Costin Dumitrescu 3(1), Anfinnur Joensen 2, Bent Djurhuus 1, Artur Johansen 1
**VÍF:** Sámal Joensen 7(2), Harald Bjørgvin 4, Áki Olsen 3, Ingi Olsen 3, Johnny Joensen 2, Ragnar Zachariasen 1, Agnar Joensen 1, Daniel Rápa 1
**Brotskøst:** StÍF 3, VÍF 3
**Útvísingar:** StÍF 3, VÍF 4
**Dómarar úr Tjaldri:** Kári Hansen & Trúgvi Mortensen

StÍF-VÍF 9-23 (3-14):

# Tómgongd í stórsigri

**Kvinnurnar úr Vestmanna vunnu ein tryggan sigur á strandingum, uttan at meistararnir nakran tíð høvdu fyri neyðini at spíla seg út**

HONDBÓTLTUR – KVINNUR
*Jákup Mørk*




*VÍF hevði ikki stórvegis trupulleikar av StÍF, og sum dysturin leið, var alt bara ein spurningur um støddina á sigrinum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

VÍF var risa favorittur, tá tær mikukvøldið vitjaðu inni á Skála. Meistararnir úr Vestmanna hava ikki roynt at tapt síðani aprí mánað í fjør, og longu eftir fáum minuttum stóð eisini greitt, at tað ikki skuldi vera hesaferð, at nakar fór at koppa teimum.

## Ferðin fór niður

VÍF legði nevnliga bragdliga fyri, og tó at bæði Ioana Rápa og Nicoleta Radu byrjaðu á beinkinum, so varð full ferð sett á málskjótingina alt fyri eitt. Eftir sjey minuttum var støðan 6-1 til gestirnar, og so var alt líka sum avgjørt. Tá var Nicoleta so eisini komin á vøllin, men Ioana varð sitandi á beinkinum alla tíðina, og hetta sigur kanska ikki so lítið.

Hesa løtuna sá veruliga út til, at tær gulu ætlaðu sær mest sum at gera av við StÍF, og sum so helt gongdin eisini fram restina av hesum hálvleikinum. Tað stóð tó greitt, tá liðini fóru til hálvleiks, at ferðin hjá VÍF var niðurgangandi, og hóast tær neyvan ætlaðu tað, so fór ferðin longur niður í seinna.

Sigurin kom tó ongan tíð í vanda. Til tess var munurin millum liðini alt ov stórur, men tað er tó undrunarvert, at VÍF mest sum í hvørjum dysti sleppur undan at skula savna seg um dystin í samfullar 60 minuttir. Og í øllum førum kann hetta gerast ein vansi, tá tær um stutta tíð skulu royna seg í europeiskum høpi, tí sleppa tær ikki at royna seg undir trýsti her heima, so kann tað gerast sera torført, tá ferð verður sett á allan dystin á tamb móti útlendskum mótstøðuliði.

## Fleiri skaðar

Hetta við mótstøðuni fær helst venjararnar hjá liðnum at hugsa sítt, men hóast trygga sigurin mikukvøldið, so gav hesin dysturin teimum eisini annað at hugsa um.
Fyrst og fremst av teirri orsøk, at Nicolina Eyðbjørnsdóttir noyddist út við skaða. Vanliga er hon ein stinnur liður í verjuni eins og í týdningarmikla kontraspælinum, men eftir at hon fyrst noyddist út við eymum ryggi, og síðani keikti sær tummilin, verður hon kanska noydd at hava ein steðg í nakrar dagar. Tað hevur Jórun Ludvig eisini í løtuni, so hóast hópurin er breiður, so skulu vestmannagenturnar helst ikki fáa fleiri skaðar, nú tað stundar til europeisku dystirnar, og í heimligu kappingini stendur helst torførasti dysturin í grundspælinum fyri framman, tá VÍF um góða viku skal til Klaksvíkar á vitjan.

## Dysturin í tølum

StÍF-VÍF 9-23 (3-14):

**Málskjúttar:**
**StÍF:** Poula D. Olsen 3, Ileana Manolescu 3(1), Anna Maria Berthelsen 1, Alina Olaru 1, Anna B. Danielsen 1
**VÍF:** Jacklin Durhuus 7(1), Sóley Mikkelsen 6(1), Fríða Marjunardóttir 6(1), Nicoleta Radu 2, Nicolina Eyðbjørnsdóttir 1, Randi Kúrberg 1
**Brotskøst:** StÍF 6, VÍF 3
**Útvísingar:** StÍF 3, VÍF 3
**Dómarar úr Tjaldri:** Kári Hansen & Trúgvi Mortensen. Høvdu millum lítið og einki at taka støðu til.



Tjaldur-Neistin 24-41 (12-19):

# Tjaldur fekk frammaná




*Mortan Hansen og teir úr Tjaldri gjørdu at enda ikki annað enn at hyggja at, meðan Jacob Jónsson og hinir neistamenninir veruliga settu ferð á málskjótingina*
*Mynd:Álvur Haraldsen*

**Eftir fleiri góð úrslit á rað kom Tjaldur niður á jørðina, tá teir fingu rættiligan bank frá Neistanum**

HONDBÓLTUR – MENN
*Jákup Mørk*

Seianstu vikurnar hevur Tjaldur givið fleiri ábendingar á, at leikluturin sum botnlið ikki er so øgiliga aktuellur í Runavíkini longur.

Tríggir dystir á rað uttan tap hava ikki bert lyft liðið av botnsessinum, men so sanniliga eisini givið vónir um, at liðið framyvir kann fara at gera ein vørr í stríðnum um heiðursmerkir.

Hetta sást eisini aftur í høllini í Runavík, tá Neistin kom á vitjan mikukvøldið. Tjokkandi fult av fólki var komið at hyggja, men sum úrslitið sigur, so fóru tey flestu av hesum vonsvikin aftur til hús.

## Týðandi jugoslavi

Fyrstu løtuna av dystinum var tað tó einki, sum bendi á, at Tjaldur skuldi gerast offur fyri einari styrkisuppvísing frá Neistanum. Tvørtur ímóti vóru teir á heimaliðnum við yvirlutan, tó at tað gekk sera javnt á.

Ikki minst hevði Neistin alstórar trupulleikar av skotsterka Dragisa Stojovic, og um miðjan hálvleikin hevði neistavenjarin sæð nóg mikið, og gav tí monnum sínum boð um at taka jugoslavan úr spælinum.

Hetta gjørdi alt fyri eitt mun. Tjaldursspælið steðgaði at kalla upp, og at fleiri bóltar vorðu tveittir burtur, skapti sjálvandi møguleika fyri nøkrum løttum málum til gestirnar.

Neistin vann sær soleiðis eina hampuliga trygga leiðslu undan steðginum, og í seinna hálvleiki tóktust teir eina mest at hugsa um at fasthalda hesa.

## Skrædnaði

Munurin øktist heldur ikki nakað serligt fyrstu løtuna av seinna hálvleiki, men eftir kundu tjaldursmenninir akkurát tað sama vera farnir undir brúsuna.

Tað hevur áður víst seg, at venjingarstøðan er størsti meinbogin hjá liðnum, og hóast hon er batna, so er hon enn ikki hædd við bestu liðini í landinum. Alt skrædnaði, tá Tjaldur í eina góða løtu spældi 4 móti 6 (og nøkur sekund 3 móti 6). Neistin fekk tá trý mál á rað, og so góvust teir á heimaliðnum bara at spæla.

Sum so høvdu teir tá heldur ongan møguleika at venda dystinum, men sjálvir kunnu teir neyvan vera nøgdir um, at teir soleiðis fóru niður við flagginum. Endin var, at Neistin gjørdi 12 mál seinastu 12 minuttirnar, og tí gjørdist støðan á máltalvuni alt annað enn góð hjá heimaliðnum.

## Hugburðsbroyting

Hóast stórtapið, so merkir hetta ikki, at Tjaldur einki sum helst kann gera við liðini, sum eru omanfyri Runavíkina á stigatalvuni.

Í løtum prógvaðu teir tvørtur ímóti, at hondbóltsevnini á liðnum eru góð, og í øðrum dystum hava teir eisini borið prógv um tað sama. Tað, sum nú tykist resta, er neyðuga treystið til at stríðast. Eisini tá rákið gongur ímóti, men hetta er helst nakað, sum fer at taka tíð. Tá leikarar so leingi hava verið partur av einum botnliði, kann ein hugburðsbroyting gerast trupul, men tað er lítið at ivast í, at hon fer at koma. Spurningurin er bara nær.

## Mansverjan sum trumfur

Hjá Neistanum gjørdist dysturin at enda bert ein venjing í skjótálopum, men hóast greiða sigurin, so eru ivaleyst fleiri lutir, sum venjarin fegin vil arbeiða meira við.

Her tykist tann týdningarmesti helst at vera, at fáa verjuna at rigga nóg væl. Sum er, hevur tað nærum í hvørjum dysti verið neyðugt hjá liðnum at fara út í mansverju, og hóast hendan hevur givið úrslit mest sum hvørja ferð, so er spurningurin helst, hvussu leingi hetta fer at halda.

At tað ofta gerst minni undirhaldandi hjá áskoðarunum við mansverju, man venjarin ikki leggja so nógv í, alla ta tíð at stigini koma inn á kontina, men hetta skuldi helst verið ein trumfur at spælt út, tá avgerandi dystirnir í endaspælinum standa fyri framman, og ikki nakað, sum mótstøðuliðini longu nú kunnu fara at fyrireika seg til.

## Dysturin í tølum

Tjaldur-Neistin 24-41 (12-19)

Málskjúttar
**Tjaldur:** Dragisa Stojovic 7, Zoran Sarcevic 5, Hartvig Joensen 5(2), Mortan Hansen 4(2), Sverri Justinussen 2, Svein í Heiðunum 1
**Neistin:** John Petersen 10(1), Hans Áki Dal-Christiansen 7, Kári Mortensen 6, Jacob Jónsson 6, Elmar Ósá 6, Heini Joensen 5(1), Ragnar Stakksund 1
Brotskøst: Tjaldur 5, Neistin 2
**Útvísingar:** Tjaldur 5, Neistin 2
**Dómarar úr Kyndli:** Uni Wardum & Hannis Wardum

# Máltindarnir

**Kvinnur:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Simona Dziugyte | Stjørnan | 83 | (24) |
| Gabriella Fekete | VB 81 | (21) | |
| Asta Petrauskine | Sóljan | 73 | (9) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 63 | (23) |
| Ioana Rápa | VÍF52 | (14) | |
| Katrin á Neystabø | Neistin | 44 | (21) |
| Birita Wardum | Neistin | 39 | (3) |
| Ileana Manulescu | StÍF39 | (4) | |
| Jacklin Durhuus | VÍF38 | (2) | |
| Annika Ljósstein | Kyndil | 38 | (9) |
| Anna K. Samson | Stjørnan | 37 | |
| Nicoleta Radu | VÍF35 | | |
| Sóleyð Mikkelsen | VÍF35 | (4) | |
| Regina Radó | VB 35 | (6) | |
| Hertha Simonsen | Sóljan | 31 | (1) |



*Hóskvøldið hevði Simona Dziugyte møguleika at leggja størri fjarstøðu niður til kappingarneytarnar á máltindinum*

**Menn:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Costin Dumitrescu | StÍF62 | (18) | |
| Jacob Jónsson | Neistin | 58 | (6) |
| Finnur Hansson | H7158 | (16) | |
| Høgni Klein | Kyndil | 54 | (2) |
| Heini Joensen | Neistin | 53 | (17) |
| Halgir Dahl Olesen | H7152 | (9) | |
| Bjarni Wardum | H7151 | (12) | |
| Sámal Joensen | VÍF50 | (8) | |
| Ingi Olsen | VÍF47 | (6) | |
| Dragisa Stojovic | Tjaldur | 44 | |
| Hans Áki Dal-Christiansen | Neistin | 42 | (6) |
| Mortan Hansen | Tjaldur | 40 | (4) |
| Jónleif Sólsker | Kyndil | 40 | (15) |
| Kári Mortensen | Neistin | 39 | |
| Dorica Tomic | KÍF | 37 | (7) |